# Bygdaráðsfundur

## Bygdaráðsfundurin 03.09.2012

Fundarstað: Bygdaráðssalurin F

| | | |
|---|---|---|
| Hjástødd vóru: | Símun Johannesen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Johannus Danielsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Petur J. Petersen | x |
| | Jákup M. Kjeld | x |
| | Alfred Olsen – ref. | |

**Mál nr. 108/2012 Havnamál.**

J. nr. 2010-0041-0010

Á fundi hin 14.05.2012 samtykti bygdaráðið hesar broytingar í býarætlanini fyri kommununa:

Á Nesi verður økið suður frá Agninum, eitt nýtt A2 økið (har sum blákrossheimið skal byggjast) og suður frá hesum økinum verður útlagt eitt nýtt D5.

Á Toftum verður økið frá Vesturskin og norður til Høganesvegin útlagt eitt nýtt A2 økið og somuleiðis økið frá Turkihúsinum í Oyrunum og suður til omankoyringina á Nyk. Fjørðan inni á Rætt verður útløgd sum eitt nýtt D6 øki, sum frítíðarøkið.

Kunngerðin um hesar broytingar er send bløðunum og hongd upp í svørtutalvu og á kommunuskrivstovuni, og kærufreistin er 4. juli 2012.

Tá kærufreistin var úti, var eingin kæra komin um økið úti á Nesi ella um økið inni á Kneysum og í Oyrunum, men ein kæra var innkomin um ætlaða D6 økið við Rætt.

Grundin fyri at kært verður er millum annað:, at:

1. At hetta kemur at tarna vinnuútbyggingini í økinum.
2. At tað ikki er rætt, at byggja neyst, frítíðarbygningar v.m. har vinnuligt virksemi fer fram.
3. Tað av trygdaráðum ikki er rætt at leggja fríøki her.
4. At fríøkið D6 kann vera aðrarstaðir t. d. inni í Saltnesi, bæði við Árnasker ella við Saltneskaj.

Mótmælið er undirskrivað av 13 persónum.

**Tekniska nevnd mælir til at halda fast við, at økið inni á Rætt verður soleiðis, sum tað er samtykt og avsett í broytingini í býarætlanini, og tekur sostatt ikki undir við mótmælinum frá borgarunum.**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd var samtykt við 6 atkvøðum fyri (Símun Johannesen, Petur J. Petersen, Elin á Torkildsheyggi, Súnfríð Jacobsen, Jóhannus Danielsen og Jákup M. Kjeld). Ongin var ímóti, meðan ein var blonk (Súni í Hjøllum).**

**Mál nr. 109/2012 Vegamál**

J. nr. 2011-0044-0048

Í skrivi dagfest 22.06.2012 heita borgarar Undir Nesinum á kommununa um at asfaltera vegin "Undir Nesinum" skjótast gjørligt.

**Tekniska nevnd staðfestir, at vegurin ikki er í nøktandi standi, og mælir til, at hetta verður tikið við í viðgerðini av fíggjarætlanina fyri 2013.**
**Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd.**
**Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 113/2012 Vegamál**

J. nr. 2011-0044-0048

Í skrivi dagf. 10.07.2012 heita Borgarar undir Nesinum á Nes kommunu, um at gera bilverju ella hegn á niðari síðu á vegnum frá Petur Højgaard og inn til Ninu Petersen við tað, at so høgt er oman av vegnum á hesum strekkinum.
**Tekniska nevnd mælir til, at hetta verður tikið við í viðgerðini av fíggjarætlanina fyri 2013.**
**Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.**
**Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggajrnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 114/2012 Byggimál**

J. nr. 2011-0042-0301

Jákup A. Olsen søkir um byggiloyvi til karnap á húsini á Brekkuvegi. Karnappi, ið er út frá miðhæddini, er frá suður/vesturhjørninum 3,20 m norður til hjallarahurðina og 1,20 m út og inn.
**Tekniska nevnd mælir til at geva byggiloyvi eftir vanligum treytum.**
**Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.**

**Mál nr. 115/2012 Vegamál.**

J. nr. 2011-0044-0039
Í skrivi dagf. 18.06.2012 heita borgarar Undir Nesinum, á kommununa um at gera gøtu oman í Saltnes, sum sambindur býlingarnar báðar.
**Tekniska nevnd mælir til, at hetta verður tikið við í viðgerðini av fíggjarætlanina fyri 2013, grunda á eina kostnaðarmetin frá Teknisku deild.**
**Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd.**
**Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 119/2012 Vegamál.**
J. nr. 2012-0044-0059
Í skrivi dagf. 09.08.2012 boðar SEV v/Terja Nielsen frá, at í samband við uppseting av teimum nýggju vindmyllunum er neyðugt at breiðkað Agnið frá Æðuvíksvegnum og yvir til Mylluvegin, tí kranin er ov breiður til verandi veg.
SEV hevur biðið FALKON v/Johan Berg gjørt arbeiðið og hevur fingið loyvi frá Landsverk at breiðka vegin eins og loyvi frá Nes haga.
Borgarstjórin hevur givið grønt ljós fyri breiðkanini, sum er farin í gongd, og verður liðug um eina góða viku grunda á, at øll onnur formlig loyvir fyriliggja.

**Tekniska nevnd mælir til at geva SEV loyvi til breiðkan av vegnum eftir vanligum treytum.**
**Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.**

**Mál nr. 121/2012 Mentamál.**
J. nr. 2012-0023-0113
Hin 12.06.2012 søkir Prematur felagið um stuðul til ein fyrilestur, sum verður hildin um ov tíðliga fødd børn.
Fyrilesturin verður hildin av Dorthe Gjerlevsen úr Danmark.

**Mentanarnevndin mælir til at játta 1.000,00 kr til fyrilesturin.**
**Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini og at taka peningin av konto ”Stuðul til mentan”.**
**Tilmælið frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 123/2012 Mentamál/Fíggajrmál.**
J. nr. 2012-0032-0005
Hin 26.06.2012 sendir Eyðun Bærentsen frá LM Electric kommununi eitt tilboð uppá levering av einum hjartastartara av slagnum CardiAid. Kostnaðurin er 11.950,00 kr. plus mvg og plus vegghaldar, ið kostar kr. 449,00 plus mvg.

**Mentanarnevndin mælir til at keypa ein hjartastartara.**
**Um tøkur peningur er, skal hetta fíggjast av stuðulskontoini.**
**Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini og at peningurin verður tikin av kontoini - Annars stuðul.**
**Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt, og at hjartastartarin verður hongdur upp í skúlanum.**

**Mál nr. 124/2012 Mentamál.**
J. nr. 2010-0024-0003
Ungdómshúsið á Toftum hevur haft ársfundin, nú eitt ár var farið síðani vit byrjaðu. Á fundinum var frágreiðing frá arbeiðinum framløgd, grannskoðaður roknskapur fyri 2011 var lagdur fram og góðkendur, Roknskapurin 2011 vísur eitt avlop uppá 13.500,00 kr.. Eisini var aktivitetsyvirlitið skúlaárið 2011-12 fram til summarferiuna framlagt og fíggjarætlanin fyri 2012 saman við yvirlitið yvir eini 35-40 tiltøkum sum vera í húsinum 2012, og er hetta sent kommununum og áhugabólkum.

**Mentanarnevndin tók hetta sum kunning.**
**Fíggjarnevndin tók hetta eisini sum kunning.**

**Mál nr. 127/2012 Frítíðarskúlin.**
J. nr. 2012-0031-0135.
Frítíðarskúlin hevur søkt eftir hjálparfólkið og stuðlum til børn við serligum tørvi.
Tá freistin var úti vóru 17 umsóknir innkomnar, men ongin pedagogur søkti nakað starv. Leiðarin hevði samtalur við nakrar av umsøkjarunum og gjørdi síðani sína innstilling, við 3 umsøkjarum til hvørt starvið.

Trivnaðarnevndin viðgjørdi umsóknirnar og innstillingarnar frá leiðaranum, á fundi hin 11.08.2012 og samtykti at taka undir við

tilráðingini frá leiðaranum og seta 2 stuðlar til 2 av børnunum og 3 hjálparfólk til 3 av børnunum.

**Bygdaráðið samtykti einmælt at taka undir við avgerðini hjá Trivnaðarnevndini.**